# Stangari dómarar



Frá komandi kappingarári at rokna, kunnu hondbóltsleikarar rokna við at fáa fýra fingrar frá dómaranum, um leikarin ikki skikkar sær nóg væl
Myndaviðgerð: Álvur Haraldsen

**Frá komandi kappingarári verða hondbóltsreglurnar herdar nakað. Bæði leikarar og venjarar verða nú revsaðir harðari, um tey ikki skikka sær nóg væl**

HONDBÓLTSREGLUR
*Jákup Mørk*

Um leikarar ikki bera seg sømiliga at á vøllinum, verður hetta frá komandi kappingarári revsað enn harðari. IHF hevur seinasta árið roynt eina nýggja skipan við útvísingum í millum annað íslendsku kappingini, og hetta hevur hepnast somikið væl, at reglurnar frá 1. august verða settar í gildið.

## Fýra fingrar

Nýggjur reglurnar innibera fyrst og fremst tvær stórar broytingar. Onnur er, at umframt at vísa leikarum tveir fingrar á vøllinum, fær dómaraparið nú eisini møguleika at geva leikara fýra fingrar. Hetta verður gjørt, um leikari á vøllinum mótmælir einari útvísing. Sostatt ræður nú bert um at akta og tiga.

Hin stóra broytingin er, at tað nú eisini ræður um hjá venjarunum og øðrum avvarandi at skikka sær betri. Í verandi skipan hevur dómarin møguleika at geva fólki á beinkinum gult og reytt kort, men framyvir kunnu eisini gevast tveir fingrar til hesi. Hetta virkar soleiðis, at um t.d. venjarin fær tveir fingrar, so skal ein leikari út í tveir minuttir, og so verður tað upp til venjaran at gera av, hvør hesin skal verða. Sostatt kemur revsingin fyri ósømiliga atburð á beinkinum nú harðari fyri liðið sum heild.

Sum nevnt, so hava reglurnar hetta kappingarárið verið royndar í Íslandi, áðrenn tær nú verða settar í altjóða gildið. Hetta við at royndarkoyra nýggjar reglur er vanligt í slíkum sambandi, og er hetta eisini nakað, sum verður nýtt innan eitt nú fótbóltin.

**Um vikuskiftið var annað umfarið í einstaklingakappingini í amboðsfimleiki hildið á Stórheyggi í Havn**

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*

Hetta er næsta av trimum kappingum, sum í vetur verða hildnar, og er ætlanin, at einstaklingakappingin framyvir kemur at fevna um minst tríggjar kappingar. 16. desember varð kappast í ringum hjá dreingjum og á bita hjá gentum, kappingin hesa ferð fevndi um lop, og hin 10. februar verður seinasta kappingin, tá kapp

Úrslitini í ymsu bólkunum framganga av talvunum her:



| | | | |
|---|---|---|---|
| Gentur, bólkur 3 (14-15 ár) | | | |
| 1 | Mia Mortensen | Ljósið | 7,90 |
| 2 | Unn Kragesten | Ljósið | 7,40 |
| 3 | Vanja Højgaard | Støkk | 7,30 |
| 4 | Ann Mari Róin Johannesen | Støkk | 7,15 |
| 5 | Elsa Helmsdal | Ljósið | 6,95 |
| 6 | Elisabeth Jacobsen | Støkk | 6,9 |
| 7 | Bjørg Danielsen | Ljósið | 6,7 |
| Gentur, bólkur 4 (16 ár og eldri) | | | |
| 1 | Marit Magnussen | Støkk | 8,20 |
| 2 | Marjun Persson | HF | 7,85 |
| 3 | Inga Thorkildshøj | HF | 7,75 |
| 3 | Anna Hansen | Støkk | 7,75 |
| 3 | Marina Moraites | HF | 7,75 |
| 6 | Durita Knudsen | Støkk | 7,65 |
| 7 | Súsan P. Olsen | 7,60 | |
| 8 | Anita Knudsen | Støkk | 7,50 |
| 8 | Sólrun Michaelsen | HF | 7,50 |
| 10 | Sarita Heinesen | Støkk | 7,40 |
| Dreingir, bólkur 3 | | | |
| 1 | William Holm Jacobsen | HF | 6,85 |
| 2 | Knút Jarnskor | HF | 6,75 |
| 3 | Bogi Johannesen | Støkk | 6,55 |
| 4 | Jónleif Højgaard | Støkk | 6,50 |
| Dreingir, bólkur 4 | | | |
| 1 | Høgni R. Øster | HF | 7,50 |
| 2 | Magni Jacobsen | Støkk | 7,15 |
| 3 | Tórarin Holm Petersen | HF | 7,1 |
| 4 | Høgni H. Andersen | HF | 7,05 |
| 5 | Poul Esper Hanussarson | Støkk | 6,90 |
| 6 | Heini í Dali | HF | 6,50 |

# Hálvfinalurnar fluttar

**Hálvfinalurnar í Coca-cola kappingini verða fluttar, orsakað av framskundaðari fráferð hjá U-20 landsliðnum**

FLYTINGAR
*Jákup Mørk*

Upprunaliga varð ásett, at seinnu hálvfinalurnar í Coca-cola kappingini hjá monnum skuldu leikast 31. januar. Ætlanin var tá, at U-20 landsliðið skuldi av landinum til altjóða kapping hin 1. februar.

Nú er hendan fráferð tó broytt, soleiðis at U-20 liðið fer avstað 31. januar, og verða hálvfinalurnar hjá monnunum tí fluttar ein dag fram.



*Ingi og VÍF skulu spæla seinnu hálvfinaluna móti Kyndli hin 30. januar ístaðin fyri hin 31.*

# Herfølge selir áleypara

**Thomas Christensen fer í vár at spæla í týsku bundesliguni**

SUPERLIGA
*Jákup Mørk*

Tað mundi koma væl við hjá Herfølge, tá danska meistaraliðið í heyst fekk tilgongd av einum fyrrverandi sponskum landsliðsleikara. Síðani hann blaðungur slapp at royna seg á landsliðnum, og varð skýrdur sum eitt risa stórt álopstalent, hevur tað tó fyri tað mesta gingið niður eftir hjá Thomas Christensen, sum spælarin eitur.

Eftir at hava roynt seg í ymsum smærru sponskum feløgum og eftir eitt miseydnað uppihald í grikskum fótbólti, setti Thomas Christense í heyst kós móti faðirlandinum (mamman er sponsk), har hann síðani hevur roynt seg hjá Herfølge.

Í sáttmálanum, sum hann gjørdi við Herfølge, var eisini niðurfelt, at hann skuldi hava møguleika at fara, um onkur útlendskur keypari gjørdi vart við seg, og hetta er nú hent.

Heimasíðan hjá Herfølge skrivar, at felagið og Thomas eru komin ásamt um at selja álopsleikaran til eitt týskt felag, sum spælir bundesliguni. Tað verður ikki nevnt, hvat felag talan er um, men væntandi varð hetta kunngjørt í gjár.



Søkt verður eftir

NÆMINGI

Til handil/skrivstovu okkara

Vilt tú hava eina áhugaverda og fjøllbroytta útbúgving?

- Sum næmingur hjá okkum fært tú eina sera fjøllbroytta útbúgving innan alt skrivstovu– og søluarbeiðið har dentur verður lagdur á teldu-útbúnað.

Arbeiðið umfatar:
- Sølu og klárgerð av teldum/teldutilhoyri.
- Avgreiðslu av ordrum/tilboðum.
- Telefonavgreiðslu.
- Samskifti við útlendskar leverandørar.
- Vanligt skrivstovuarbeiðið.

Krøv:
- Umsøkjarar skulu hava lokið FHS ella tilsvarandi prógv.

Umsókn:
- Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 25. januar 2001.

Er áhugi fyri fleiri upplýsingum, kanst tú seta teg í samband við Anju Solberg á tlf. 317620.

SrF Teldu Tænastan
Staravegur 5
Postsmoga 1144
FO-110 Tórshavn
Telefon: (+298) 317620
Telefax: (+298) 317699
Heimasíða: www.tt.fo

Almanna- og Heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin

Sjúkrasystrar

Á B7 er fulltíðarstarv sum avloysari fyri sjúkrasystir í farloyvi leyst at søkja. Starvið er í blandaðum vaktum til setan 15. februar 2001 til 28. februar 2002. Harumframt er avloysarastarv sum sjúkrasystir á starvsbrøki 0,8 í dag- og náttarvakt í fastari skipan leyst til setan 15. februar 2001 til 30. november 2001.

Deildin hevur 19 seingjapláss og tekur sær av sjúklingum við m.a. onkologiskum-, nýra-, lungagigta- og ryggjasjúkum v.m. Tað starvast nógvar royndar sjúkrasystrar á deildini og upplæring fer fram.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Evu Mortensen, deildarsjúkrasystir á lokal 107 ella Ásu Poulsen, yvirsjúkrasystir, lokal 300.

Setanartreytir:
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknarfreistin er 1. februar 2001 kl. 14.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

Almanna- og heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

KONSERT

í Listaskálanum
mikukvøldið 17. jan. kl. 20.00

Mozart
Dove sono úr Figaro

Händel
Rejoice

Boismortier
Sonata op. 7 nr. 4

Mozart
Adagio

Weiss
Fimm skitsir

Cherubini
Adagio

Schubert
Hirt auf dem Felsen



Tórshavnar Floytutrio:
Andrea Heindriksdóttir, Magna Jógvansdóttir og Gunnvør Eyvindsdóttir Mohr

Tórshavnar Kamartrio:
Berghild Poulsen sopran, Bjarni Berg klarinett og Árni Hansen klaver

KONSERTFELAGIÐ




